Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Status fyri tunnilsverkætlanir, har møgulig endalig fíggjarlig avrokning ikki er framd

Spurningar:

Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvat status er við hesum verkætlanum:

1. **Tunlarnir norður um fjall** – er nakað fíggjarligt útistandandi millum byggiharra og byggifelagið, sum framdi verkætlanina?
   – Um so er, hvussu stór er upphæddin?
   – Er svarið játtandi, er upphæddin tá tøk innan fíggjarligu karmarnar?
2. **Fámjinstunnilin** – er hann endaliga avhendaður og avroknaður við byggifelagið, ella er enn arbeiði eftir at fremja?

Viðmerkingar:

Tað er av stórum týdningi, at Løgtingið í sambandi við viðgerð av fíggjarlóg og játtanum til verkætlanir hevur greiða og dagførda kunning um støðuna í byggi- og tunnilsverkætlanum, serliga um avbjóðingar eru í fíggjarligum avrokningum. Tað eigur at verða greitt, um verkætlanir, sum eru lidnar ella um at verða lidnar, men ikki endaliga avroknaðar, kunnu viðføra stórar eykakostnaðir og krav um eykajáttanir.

Hetta er viðkomandi bæði fyri fíggjarliga gjøgnumskygnið og fyri álitið á almennar verkætlanir.

Tí verður hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 9. oktober 2025

Johan Dahl